# Keðiligt kegl

*HÓLMGONGA. Orðadrátturin millum Høgna Hoydal og Jóannes Eidesgaard í útvarpshøllini fyrrakvøldið gjørdist ikki so spennandi, sum væntað*



HØGNI MOHR

Jóannes Eidesgaard byrjaði politisku hólmgonguna, sum Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag skipaði fyri fyrrakvøldið, við at hugleiða um hugtakið hólmgongu: Tveir mans verða settir í ein hólma at berjast. Bert annar kemur livandi heimaftur.

Men eftir hólmgonguna í útvarpshøllini sluppu báðir politikararnir heimaftur við sítt fríska lív.

### Eidesgaard góðan start

Jóannes Eidesgaard legði út við at vera óvanliga spoyskur. Hann samanbar óbeinleiðis fullveldisrørsluna við, tá ið Hitler leyp á Russland. Kortini var ongin ivi um, at tað var hin stóri røðusnillingurin, ið gjørdi burtur úr sær at byrja við. Jóannes Eidesgaard nýtti nógvar smáar steðgir, til tess at fáa uppmerksemi. Og tað riggaði; at byrja við.

Høgni Hoydal endurtók seg sjálvan og greiddi frá samráðingargongdini. Landsstýrismaðurin var sera hóvligur, tá ið hugsað verður um, at talan skuldi vera um eina hólmgongu.

### Jóannes misti tráðin

Sum orðaskiftið gekk, tyktist Jóannes Eisesgaard meiri ókonsentreraður. Fleiri ferðir var hann um at missa tráðin, og hann legði onkra fellu fyri seg sjálvan. Áhoyrarar brustu út úr at flenna nakrar ferðir; summir tí teir hildu próvførsluna hjá javnaðarmanninum vera ov populistiska og grunna. Eidesgaard samanbar t.d. fullveldi við lond sum Eysturtimor og Eritrea. Hann var eisini meira flokspolitiskur bundin í sínum úttalilsum enn Høgni Hoydal.

Einaferð tá ið Jóannes varð avbrotin, tveitti hann pennin eftir borðinum í forargilsi og skrykti brillurnar av. Og hann hevði eisini lyndi at finnast at orðstýraranum, Tróndi Djurhuus.

### Høgni endurtók

Men Jóannes Eidesgaard royndi kortini at vinda seg sjálvan upp, tí Høgni ávirkaði ikki huglagið í stúvstappaðu høllini stórvegis. Meginpartin av tí, sum Høgni Hoydal segði, hava fólk hoyrt áður. Hann var sakligur, men eisini litleysur; í løtum meira sum ein embætismaður enn sum politikari, sum ein av áhoyrarunum tók til. Ofta brúkti hann orðingina »púra burturvið«, meðan Jóannes Eidesgaard hinvegin eins ofta gjørdi greitt, at »tað er ikki okra problem«.

**Jóannes Eidesgaard:**

»Tað er ein skaðiligur dámur komin yvir samráðingarnar – hetta, at mann bara krevur og krevur«

»Vit kunnu ikki satsa so nógv uppá tað politiska frælsið, at tað persónliga frælsið fer fyri bakka«

»Ríkisfelagsskapurin er nakað, sum allir føroyingar hava eitt forhold til. Uppá gott og ilt«

»Trupulleikin hjá Høgna Hoydal er ikki so nógv, at Javnaðarflokkurin ikki er við honum, men at hann ikki hevur fólkið aftanfyri seg«

»Munurin millum uppskotið hjá samgonguni og uppskotið hjá Javnaðarflokkinum er, at vit siga: Sjálvsstýrið er ein prosess – ikki ein samtykt«

**Høgni Hoydal:**

»Ein orsøk til at danska stjórnin fer fram, sum hon ger í løtuni, er, at hon veit, at ósemja er í Føroyum«

»Føroyingar eru ikki biddarar og nassarar. Danir hava fingið minst líka nógv burturúr sambandinum, tá ið alt verður talt við«

»Andstøðan brendi av 2 milliardir uppá 20 minuttir undir fíggjarlógarviðgerðini seinast«

»Flokkarnir, sum fara at hava tað truplast í framtíðini, eru teir, sum hava livað av at býta út danskar pengar í Føroyum«

»Vit kunnu ikki fara og bakka bara tí at tað kemur eitt lot av Christiansborg«

### Forsyndaður

Eitt, sum kom týðiliga fram undir hólmgonguni var, at Jóannes var firtin inn á Høgna, tí Javnaðarflokkurin ikki slapp upp í samgonguna og tí hann varð koppaður sum formaður í uttanlandsnevndini.

Jóannes brúkti eisini sera nógva tíð at siga Høgna Hoydal, hvat Høgni Hoydal meinti og ætlaði. Høgni spurdi hinvegin Jóannes fleiri spurningar, men tað gekk sera illa at fáa svar.

Tað er annars ein partur av hólmgongukonseptinum, at politikarar spyrja hvønnannan. Men ístaðin fingu áhoyrarar ta fatan, at Jóannes varð forsyndaður og eitt sindur østur.

### Tom hólmgonga

Tað var ikki rættiligt flog yvir hólmgonguna. Luttakararnir tyktust snøgt sagt ikki at vera í venjing. Og ætlanin við hólmgonguni; at talan skuldi vera um eitt livandi og nærgangandi orðaskiftið; eydnaðist ikki. Tvørturímóti var tað heldur tamt.

At dysturin ikki var varpaður úr, og at talan var um eitt tjóðveldistiltak, hevur kanska sissað fólk. Eisini vóru teymarnir hjá orðstýraranum í leysara lagi.

Nærum trý koyrter gingu áðrenn fyrstu lógvabrestirnir ljóðaðu í høllini. Og hesir brestir hoyrdust bert 3-4 ferðir. Harðast varð klappað, tá ið Høgni Hoydal mátti rætta Jóannesi Eidesgaard faldaran hjá Javnaðarflokkinum, tí Jóannes ikki hevði hann við sær heimanífrá.

Kanska vísti hesin tilburðurin júst, hvør teirra, ið var best fyrireikaður hetta kvøldið.

**Kartni Olsen, Tórshavn:**



Áðrenn:

*Hvør fer at vinna hólmgonguna?*
- Hoydal..!
*Hví?*
- Tí hann er á røttu leið. Eg vóni, at vit loysa; ongantíð ov skjótt!

Aftaná:

*Hvør vann í kvøld?*
- Høgni kláraði seg væl.
*Hví?*
- Tí hann hevur eitt greitt endamál meðan Jóannes Eidesgaard ríður á tveimum rossum; sambandinum og sosialismuni.
*Hvussu var orðaskiftið?*
- Sera siðiligt. Men spell er tað, at sosialistarnir ikki kunnu koma við á fullveldisleiðina. Tað nívir meg almikið, tí Jóannes er ein góður politikari.

**Ragna Høgnesen, Tórshavn:**



Áðrenn:

*Hvør vinnur hólmgonguna í kvøld?*
- Høgni Hoydal, vænti eg...
*Hví?*
- Hann hevur orðið í sínari makt. Hann dugir betur at argumentera!

Aftaná:

*Hvør vann hólmgonguna?*
- Eg haldi ikki tað ber til at siga, at nakar vann. Høgni plagdi at klára seg betur enn í kvøld. Styrkin hjá Jóannesi Eidesgaard er, at hann dugir væl at tosa, meðan Høgni Hoydal er meira innihaldsríkur. Annars væntaði eg, at tað fór at vera nógv harðligari og ógvusligari. Hattar har er ikki annað, enn tað mann hoyrir til dagligt. Eg havi onki lært í kvøld...

**Jógvan Sundstein, Tórshavn:**



Áðrenn:

*Hvør vinnur hólmgonguna?*
- Høgni Hoydal hevur uppiborið at vinna, og eg vænti eisini at hann vinnur!
*Hví?*
- Tí hann hevur eina betri sak. Kanska Høgni er eitt sindur meira tungur fyri málinum, men hann hevur logikk og góð argument at stuðla seg til.

Aftaná:

*Hvussu var úrslitið av hólmgonguni?*
- Høgni kom betur frá tí. Tað er púra greitt at Jóannes er fornermaður, og hetta er eitt stórt minus fyri orðaskiftið. Høvuðsorsøkin til, at hann ikki stuðlaði fullveldinum var, at hann ikki slapp framm at eftir valið í ´98. Annars kláraði Jóannes seg hampuliga væl, men tá ið hann fekk spurningar, t.d. um hann hevði gingið inn fyri íslendska modellinum, so svaraði hann ikki upp á tað. Hann slapp sær undan at svara!



# Føroyska fiskivinnan klárar seg hampuliga væl

*Mikudagin 14.juni var seinasta seminarið í røðini um lønsemi í føroysu fiskivinnuni, samanborið við lønsemi í Noregi og Íslandi. Tað er ráðgevandi felagið Sp/f Farec, sum hevur staðið fyri verkætlanini*

Í tíðindaskrivi frá Vinnuhúsinum verður sagt, at verður hugt eftir tí partinum av føroyska flotanum, sum í høvuðsheitum fiskar undir Føroyum, kann sigast um stórt sæð allan flotan, at 1997 og 1998 hava verið tvey góð ár, har rakstrarúrslitini hava staðið mát við samlaðu íløgurnar og soliditeturin er styrktur. Tað er torført at áseta, hvat eitt nøktandi ognaravkast er, tí tað kann skifta alt eftir hvørja vinnu ein tosar um, men vanliga verður sagt, at ognaravkastið skal í minsta lagi vera hægri enn rentan á skuldini. Ognaravkastið sigur nakað um, hvussu stórur vinningurin er av samlaðum kapitali.



### Ognaravkastið

Ognaravkastið hjá føroyska fiskiflotanum er í frá 1996 til 1998 fari frá at vera ov lítið til at verða sera gott fyri allar skipabólkar - uttan rækjutrolarar, og má hetta sigast at vera ein positiv gongd. Serliga partrolararnir, línubátarnir og garnabátarnir hava sera góðan soliditet í 1998. Somikið góðan, at teir áttu at tolt eitt vánaligt ár, um ella tá eitt tílíkt kemur. Lemmatrolararnir høvdu ikki klára seg í 1996 og 1997 um teir ikki høvdu fingið íløgustuðul. 1998 var tó eitt rímuligt ár hjá hesum partinum av flotanum sæð í mun til undanfarin ár.

Samlaða úrslitið í føroyska fiskiflotanum í 1998 var góðar 165 mió kr., harav hevði tann parturin, sum í høvuðsheitum fiskar við Føroyar, eitt yvirskot uppá umleið 91 mió kr.

### Soliditeturin

Soliditeturin hjá føroysku fiskavirkjunum sýnist eisini at vera góður. Í 1996 var soliditeturin hjá 7 føroyskum virkjum 6 %, meðan hann í 1998 var komin upp á 42 %, so virkini eru betur fyri at standa ímóti tapi, nú enn nakrantíð. Ognaravkastið í 1996 var -7%, meðan tað í 1998 er 14%, sum er eitt sindur hægri enn miðal rentan av fremmandari skuld.

Tað er ikki einfalt at samanbera norsku og íslendsku fiskivinnuna við føroysku, tí strukturin í vinnunum er so ymiskur. Í Íslandi er vertikal integratión av veiðu-, framleiðslu- og sølulíðið, sum ger at fyritøkurnar disponera út frá einum heildarsjónarmiði — hvat er best fyri alla fyritøkuna og ikki, fyri hvørt lið sær. Í Noregi er fiskivinnan merkt av planbúskapi, har rávøran verður seld gjøgnum »Råfisklaget«, sum síðani stýrur hvar rávøran verður arbeidd. Í føroysku fiskivinnuni er lítil integratión millum veiðu, framleiðslu og sølu og sera hørð kapping um fiskin bæði millum fiskavirkir og sølufyritøkurnar.

Interpolerað roknskapartøl fyri íslendska, norska og føroyska vinnu vísa, at tað sær út til, at føroyski flotin betri er førur fyri at forrenta seg enn íslendski flotin, sum hevur munandi størri rávørugrundarlag. Hetta kemst partvís av, at prísmunurin á ráfiski í Íslandi og Føroyum er sera stórur, og at íslendsku skipini hava stóra skuld orsaka av, at kvotur verða keyptar fyri sera høgan prís.

### Strukturурin

Fyri fiskiídnaðin vísa tølini, at samanborðið við norsku og íslendsku fiskavirkini, so er samlaða ognaravkastið í føroyska fiskiídnaðinum hægri enn ognaravkastið í norska og íslendska ídnaðinum. Bruttovinningurin í føroyska fiskiídnaðinum er ájavnt við bruttovinningin í norska fiskiídanðinum og væl lægri enn í íslendska fiskiídnaðinum.

Nakrar ávegis niðurstøður frá verkætlanini eru, at føroyska fiskivinnan klárar seg hampuliga væl samanborðið við íslendsku og norsku vinnuna. Føroyski fiskiídnaðurin keypur rávøru fyri væl hægri prísir enn norski og íslendski fiskiídnaðurin ger, og fíggjarliga gongdin hjá føroysku virkjunum er á leið tann sama sum í grannalondunum. Hetta tíðir uppá, at føroysk fiskivinnan far sum mest burturúr í veiðiliðnum, framleiðsluliðnum og í søluliðnum, og at tann struktur, ið er í føroysku fiskivinnuni, hevur góða ávirkan á lønsemi í vinnuni, skrivar Vinnuhúsið.

# Avgjald til gransking

*Allur norskur laksur, sum verður útfluttur, skal gjalda avgjald til gransking*

Norska Stórtingið hevur ásett avgjaldið at verða 3 promillu av útflutningsvirðinum og er tað millum 90 og 100 milliónir norskar krónur, sum skulu brúkast til gransking í norsku fiski- og alivinnuni. Norski staturin hevur somuleiðis játtað somu upphædd til gransking og var tað ein av fyritreytunum fyri at avgjaldi fekk undirtøku í Stórtinginum.

Peningurin verður umsitin av einum stýri, sum norska Fiskimálastýrið hevur sett í samstarvi við Granskingarráðið. Úrslitini av granskingini fara at verða opin fyri øðrum londum, soleiðis at tøkni og onnur menning eisini kemur øðrum tjóðum, sum fáast við aling, til góðar.

### Ikki eginpeningur

Reglurnar, ið norska granskingarráðið arbeiðir eftir, siga at øll gransking er opin, undantikið tá virkir eru við í verkætlanunum og hava goldið meira enn helvtina av upphæddini. Peningurin sum stendur í hesum grunni verður ikki góðtikin sum eginpeningur hjá virkjum.

Norska Granskingarráðið og vinnufeløgini arbeiða nú við at býta peningin út á tey økir teir meta røtt eru at satsa uppá, skrivar Vinnuhúsið.

*Almennur fyrispurningur til Dorethu Block:*

# Grindaboð! Grindaboð! – men grindin skal hvørki rekast ella drepast!!!

Á fundi hjá Grindamannafelagnum havi eg hoyrt tygum greiða frá, um ætlanina at seta sendarar á einar 6 hvalir í fyrstu grind, sum verður vestan fyri í summar. Grindin skal síðan rekast aftur til havs. Hetta verður gjørt fyri at kunna fylgja við, hvussu grindahvalirnir ferðast.

Orsøkin til henda fyrispurning er, at eg ikki haldi tað er komið nóg greitt fram millum manna, hvussu mannagongdin verður, eftir at sendararnir eru festir á hvalirnar, og teir aftur svimja á opnum havi og í firðum.

Spurningar mínir eru:

- Hvussu ofta verður rapporterað, hvar hvalir eru staddir, og verður tað gjørt alment, t.d. í útvarpið og bløðum?
- Verður tað álagt teimum, sum finna grind, fyrst at kanna, um viðkomandi grind kann rekast á eina hvalvág?
- Kann tað henda, at hvalirnir, sum hava fingið sendarar ásettar, fara hvør í sína æt og enda í 6 ymiskum bólkum?
- Hvussu leingi fer hendan kanning at vara?

Vit kunnu ímynda okkum, at grind verður funnin av landi ella frá báti, grindaboð verða givin yvir VHF ella telefon (eingin rópar »grindaboð« longur), og ein hópur av bátum fer á staðið, har grindin er. Hvussu skulu menn tá bera seg at, um teir fáa at vita, at júst hesin bólkur fekk sendarar festar í hornini, í fyrstu grindini vestanfyri.

 Eg gangi út frá, at hetta hevur almennan áhuga, og fari eg at heita á tygum um at greiða nærri frá hesum ætlanum í bløðunum, so at allir føroyingar verða kunnaðir um støðuna, áðrenn grindaboðini koma – grindaboð koma jú so brádliga.

Vinarliga,

**Andras Joensen, Klaksvík**

